# Leiðbeining til e-umsóknarblað um upptøku á Fróðskaparsetri Føroya 2024

**Les leiðbeiningina væl ígjøgnum, áðrenn tú útfyllir e-umsóknarblaðið!**

## Áðrenn tú søkir

### Kvota 1 ella kvota 2?

Fyrst skalt tú velja, um tú skalt søkja inn eftir kvotu 1 ella kvotu 2. Hvat skalt tú velja?

### Kvota 1

Øll, ið hava **gymnasialt miðnámsprógv**, ið er lokið á føroyskum ella norðurlendskum miðnámsskúla, kunnu søkja um upptøku gjøgnum kvotu 1. Í kvotu 1 verður einans hugt eftir próvtøkuúrslitinum (miðalpróvtalinum) í gymnasiala miðnámspróvnum. Legg til merkis, at tú eisini mást lúka møgulig serkrøv til útbúgvingina, tá tú søkir gjøgnum kvotu 1.

Gymnasial miðnámsprógv í Føroyum eru:

| | |
|---|---|
| Búskaparbreyt (Hægri Handilsskúli) | HHX |
| Hugbreyt (Málsligur studentur) | Stx spr. |
| Náttúrubreyt (Støddfrøðiligur studentur) | Stx mat. |
| Tilfeinsgisbreyt (Hægri Fiskivinna) | HIF |
| Tøknibreyt (Hægri Tøkni) | HTx |
| Fyrireikingarbreyt (Hægri Fyrireiking) | HF |

### Kvota 2

Kvotu 2-umsøkjarar kunnu býtast sundur í tríggjar bólkar:

- Umsøkjarar, ið ivast í, um tey hava nóg høgt miðalpróvtal í gymnasiala miðnámspróvnum til at verða upptikin gjøgnum kvotu 1
- Umsøkjarar, ið hava útlendsk miðnámsprógv
- Umsøkjarar, ið ikki hava gymnasialt miðnámsprógv, sum tískil søkja um undantaksloyvi frá vanligu upptøkutreytunum

Í kvotu 2 verða eisini aðrir førleikar enn gymnasialt miðnámsskúlaprógv tiknir við í metingina, sum t.d. aðrar útbúgvingar, starvsroyndir, háskúli, longri steðgir uttanlands og ævisøga tín. Einans førleikar, ið eru skjalprógvaðir, verða tiknir við í viðgerðina av umsóknini.

### Málslig krøv

Tá tú søkir, skalt tú skjalprógva, at tú kanst fylgja við á undirvísingarmálinum, sum í útgangsstøði er føroyskt. Undirvísingarmál umfatar í hesum høpi bæði sjálva undirvísingina og tilfarið, ið verður nýtt. Tilfarið kann vera føroyskt, norðurlendskt og enskt, og tí er neyðugt hjá lesandi at duga at skilja hesi mál.

Hevur tú ikki føroyskt, norðurlendskt og enskt á miðnámsskúlastigi, skalt tú skjalprógva, at tú á annan hátt hevur ognað tær neyðugu førleikarnar at fylgja undirvísingmálinum á útbúgvingini.

Kanst tú ikki skjalprógva neyðuga førleikan í undirvísingarmálinum, kanst tú verða biðin um at møta til samrøðu ella málroynd, sum staðfestir kunnleika tín í undirvísingarmálinum.

Eru málslig serkrøv til valdu útbúgvinga, skalt tú lúka hesi.

# Til e-umsóknarblað

## 1. Persónsupplýsingar

Fyrsta stig í umsóknarblaðnum eru upplýsingar um teg.

Skriva øll *fornøvn* og *eftirnavn* í teigarnar. Legg til merkis, at tú einans hevur **eitt** eftirnavn, millumnøvn eru her at rokna sum fornøvn.

Vel *ríkisborgaraskap*. Ert tú ikki danskur ríkisborgari, velur tú "Annar" og skrivar tín ríkisborgaraskap.

Vel síðani *kyn*.

Upplýs síðani *p-tal* (dømi: 011095-123).

Hevur tú ikki føroyskt p-tal, ber ikki til at søkja við e-umsókn, og mást tú tískil søkja við at útfylla pappírsumsóknarblað. Umsóknarblaðið finst á www.setur.fo.

Tú skalt upplýsa títt *fartelefonnummar*. Fært tú nýtt fartelefonnummar, eftir at umsóknin er send, skalt tú boða Setrinum frá beinanvegin á lestur@setur.fo. Til ber eisini at upplýsa eitt annað *telefonnummar*, t.d. heimatelefon, telefonnummar hjá maka, foreldrum ella øðrum.

*Samband í feriu*: Av tí at svar um upptøku verður sent út í summarfrítíðini, er tað av stórum týdningi, at tú upplýsir okkum, hvussu Setrið kann koma í samband við teg í summarfrítíðini. Eitt dømi kann vera eitt annað telefonnummar, ið tú ert at hitta á ella ein annar bústaður, um tú t.d. ert uttanlands ella í frítíðarhúsi.

*Bústaður*: Byrja við at upplýsa okkum, hvørjum *landi* tú býrt í. Er landið ikki á listanum, velur tú "*annað*" og skrivar landið. Upplýs síðani *býur/bygd*, *postnummar*, *gøtunavn*, *húsanummar* og møguligt *postrúm*. Flytir tú bústað, eftir at umsóknin er send inn, skalt tú beinanvegin boða Setrinum frá nýggja bústaði tínum á lestur@setur.fo.

## 2. Raðfestingarlisti

Her skrivar tú, hvørjar útbúgvingar tú ætlar at søkja inn á og í hvørji raðfylgju. Sum fyrsta val skrivar tú ta útbúgvingina, sum tú helst vilt fara undir. Markið er trý útbúgvingarynski.

Um tú ikki verður upptikin á útbúgvingina, tú hevur sum fyrstu raðfesting, kanst tú við at seta kross velja at vera á bíðilista til hesa. Tú missir tó ikki plássið, sum tú ert komin inn á.

Ger tær greitt, hvørjar útbúgvingar tú ynskir at søkja um upptøku til. Ikki er neyðugt at søkja inn á fleiri útbúgvingar, um tú einans ert áhugað/ur í einari. Hinvegin er skilagott at søkja inn á fleiri útbúgvingar, um tú ert áhugað/ur í at taka eina aðra útbúgving, skuldi tú ikki sloppið inn á útbúgvingina, sum er tín fyrsta raðfesting.

Legg til merkis, at tú einans kanst senda eina umsókn inn.

Um tøk lestrarpláss eru undan lestrarbyrjan, verður kunnað nærri um hetta.

## 3. Upptøkugrundarlag

Her skalt tú skráseta og skjalprógva útbúgvingina, ið er grundarlag fyri tínari upptøku. Fyrst skalt tú skráseta og skjalprógva títt miðnámsprógv.

Tá tú skrásetir miðnámsprógvið, skalt tú tilskila, hvat fyri *slag av miðnámsprógvi,* tú hevur, nær títt *próvtøkuár* var/er, hvørjum *próvtalsstiga* tú hevur fingið próvtøl eftir (7- ella 13-talsstiganum), hvat títt samlaða *miðalprótal* er í próvnum, og til seinast skalt tú viðfesta fílu við avriti av próvnum.

Fílusløgini, sum kunnu góðtakast, eru PDF, JPG og PNG.

**GG**: Miðalprótalið er tað, ið er nevnt *Próvtøkuúrslit* á próvnum.

**GG**: Einans umsøkjarar til bachelorútbúgvingarnar innan orku kunnu søkja um upptøku við maskinmeistaraprógvi sum upptøkugrundalag.

**Hevur tú ikki norðurlendskt miðnámsprógv, fert tú beinleiðis víðari til næsta stig (stig 4).**

**Serkrøv**

Ávísar útbúgvingar hava umframt grundkrav eisini serkrøv. Um tú søkir inn á eina av hesum útbúgvingunum, skalt tú útfylla stig, próvtalsstiga og próvtal fyri lærugreinarnar, sum eru serkrav

**Útbúgvingar við serkrøvum:**

**KT-verkfrøði**: Treyt fyri upptøku er, at umsøkjari hevur gymnasialt miðnámsprógv við støddfrøði á B-stigi. Miðaltalið vera minsta lagi 4 eftir 7-talsstiganum.

Verður søkt eftir kvotu 2, kunnu aðrar fortreytir við javnsettum kunnleikastøði góðtakast eftir nærri meting.

**Lívfrøði og mýlalívsvísindi:** Treyt fyri upptøku er, at umsøkjari hevur gymnasialt miðnámsprógv og við nøktandi úrsliti hevur staðið:

- Støddfrøði á B-stigi
- Alisfrøði á B-stigi
- Evnafrøði á B-stigi

Miðaltalið í hvørjari av hesum lærugreinum skal vera í minsta lagið 4 eftir 7-talsstiganum ella 7 eftir 13-talsstiganum.

Hjá teimum, ið søkja inn eftir kvotu 2, kunnu aðrar fortreytir við javnsettum kunnleikastøði góðtakast eftir nærri meting.

**Búskaparfrøði**: Treyt fyri upptøku er, at umsøkjari hevur gymnasialt miðnámsprógv við støddfrøði á B-stigi.

Verður søkt eftir kvotu 2, kunnu aðrar fortreytir við javnsettum kunnleikastøði góðtakast eftir nærri meting.

**Føroyskt**: Til at verða upptikin at lesa bachelor í føroyskum krevst føroyskt, gymnasialt miðnámsprógv við 5,8 í próvtali í føroyskum eftir 7-talsstiganum

**Lærara**: Treyt fyri upptøku er, at umsøkjari hevur miðnámsprógv við:

- Føroyskum á A-stigi
- Støddfrøði á C-stigi

**Sjúkrarøktarfrøði**: Treyt fyri upptøku er, at umsøkjari hevur:

- Føroyskt á A-stigi
- Enskt á C-stigi
- Danskt á stigi við fráfaringarroynd fólkaskúlans

Søkir tú inn at lesa sjúkrarøktarfrøði, skalt tú eisini hava fyrstuhjálparprógv.

Er prógvið eldri enn 2 ár tann 1. juli 2024, skal skeiðið takast umaftur. Lestrarskrivstovan kann vegleiða í hvussu tú fært tikið skeiðið. Tú rindar skeiðskostnaðin sjálv/ur.

Minst til at senda fyrstuhjálparprógvið saman við upptøkugrundarlagnum, og at seta flugubein í, um tú hevur dagført fyrstuhjálparskeið.

**Løgfrøði:** Treyt fyri upptøku er, at umsøkjari hevur svara nøktandi uppá eina upptøkuroynd. Kunning um upptøkuroyndina er at finna á okkara heimasíðu

**GG**: Lýkur tú ikki serkrøvini í tínum miðnámsprógvi, men eftirfylgjandi hevur tikið lærugreinina sum stakskeið, skalt tú minnast til eisini at viðfesta stakgreinaprógvið.

**GG: Søkir tú inn eftir kvotu 1 skalt tú beinleiðis víðari til stig 11. Stig 4-10 eru einans til kvotu 2 umsøkjarar.**

## 4. Aðrar útbúgvingar [einans kvota 2]

Áður tiknar útbúgvingar verða skrivaðar her. Talan er bæði um útbúgvingar, ið tú hevur tikið eftir miðnámsprógv og um útbúgvingar, ið ikki krevja miðnám, t.d. um tú hevur staðið í sveina- ella lærubræv. Her skalt tú eisini skriva, um tú hevur staðið partar av eini hægri útbúgving.

Tú skalt upplýsa, hvat *slag* av útbúgving tú hevur (t.d. hársniðgevi, timburmaður, kokkur ella annað), á hvørjum *lærustovni*, tú hevur tikið útbúgvingina (t.d. Tekniski Skúli í Tórshavn, Aarhus Tekniske Skole), og nær útbúgvingin er *byrjað* og *endað*.

Um tú ikki hevur fullført útbúgvingina, tá tú søkir, so skalt tú seta flugubein í teigin *"Ikki fullførd"*.

At enda skalt tú viðfesta fílu við avriti av próvnum ella annað skjalprógv, um útbúgvingin ikki er fullførd. Fílusløgini, sum kunnu góðtakast eru PDF, JPG og PNG.

Tá tú hevur skrásett útbúgvingina, sæst hon á yvirlitinum "*Skrásettar aðrar útbúgvingar*". Hevur tú fleiri aðrar útbúgvingar, kanst tú skráseta fleiri.

Tá tú ert liðug/ur at skráseta aðrar útbúgvingar, fert tú víðari til næsta stig.

**GG**: Hevur tú útlendskt prógv, skal tað sendast til meting hjá Uddannelses- og Forskningsministereiet – Styrelsen for Forskning og Uddannelse, áðrenn prógvið kann vera partur av viðgerðini. Nærri kunning fæst við at venda sær til Lestrarskrivstovuna á tlf. 352520 ella umvegis t-post til LSS@setur.fo.

## 5. Háskúli og tílíkt [einans kvota 2]

Her verður upplýst um háskúla, húsarhaldsskúla og líknandi próvleys skeið, sum tú hevur verið á.

Tú skalt upplýsa, *hvar* tú hevur verið í skúla (t.d. land og/ella bý), *navnið á skúlanum*, nær skeiðið *byrjaði* og *endaði* umframt hvussu nógvar *mánaðir* tú vart á skeiðinum.

Til seinast skalt tú viðfesta fílu við váttan um, at tú hevur luttikið á skeiðinum.

Tá tú hevur skrásett skeiðið, sæst tað á yvirlitinum "*Skrásettir háskúlar og tílíkt*".

Hevur tú onnur, viðkomandi skeið, so kanst tú skráseta tey.

## 6. Ískoytisprógv og onnur viðkomandi skeið [einans kvota 2]

Her skulu skrivast øll viðkomandi skeið (eitt nú supplering ella ískoyti), sum skulu takast við, tá ið mett verður um umsókn tína.

Hevur tú t.d. ikki staðið serkrøvini til upptøku í miðnámspróvnum, men t.d. hevur tikið skeið í hesi lærugrein á kvøldskúla, so kanst tú viðfesta skjalprógv her.

Tú skalt upplýsa, hvat *slag* av prógvi tú hevur, á hvørjum *lærustovni* tú hevur tikið prógvið umframt nær útbúgvingin er *byrjað* og *endað*.

Um tú ikki ert liðug/ur við útbúgvingina, tá tú søkir, skalt tú seta flugubein í teigin "*Ikki fullførd*".

At enda skalt tú viðfesta fílu av próvnum ella annað skjalprógv, um útbúgvingin ikki er fullførd. Fílusløgini, sum kunnu góðtakast eru PDF, JPG og PNG.

Tá tú hevur skrásett prógvið, sæst tað á yvirlitinum "*Skrásett onnur prógv*". Hevur tú fleiri onnur prógv, kanst tú skráseta fleiri.

Tá tú ert liðug/ur at skráseta onnur prógv, fert tú víðari til næsta stig.

## 7. Starvsroyndir [einans kvota 2]

Starvsroyndir verða skrivaðar her. Týdningarmiklast eru starvsroyndir, ið eru viðkomandi fyri útbúgvingina, men eisini aðrar starvsroyndir verða tiknar við í viðgerðina av umsóknini. Tú skalt upplýsa *arbeiðsgevara* (navn á fyritøkuni), *slag* av arbeiði tú hevur gjørt (t.d. avgreiðslufólk, krambafólk, timburarbeiði), nær starvstíðin er *byrjað* og *endað*, hvussu *nógvar tímar um vikuna* tú arbeiddi umframt navn, telefonnummar og t-post hjá *kontaktpersóni* á arbeiðsplássinum.

Oyðublað til váttan frá arbeiðsgevara er at finna á okkara heimasíðu Viðmæli við undirskrift frá leiðara, starvsheiti, starvsbrøki og starvstíð kann eisini nýtast sum skjalprógv.

**GG**: Setrið tilskilar sær rætt til at seta seg í samband við ásetta kontaktpersónin hjá arbeiðsgevaranum.

## 8. Longri steðgir uttanlands [einans kvota 2]

Her verður skrivað um longri steðgir, sum kunnu skjalprógvast. Einans steðgir í tríggjar mánaðir ella longri verða tiknir við í viðgerðina.

Tú skalt upplýsa í hvørjum *landi*, tú hevur verið (Danmark verður t.d. eisini roknað sum útland í hesum høpi), hvat *endamálið* við steðginum var (t.d. fjakkara-ferð, hjálpararbeiði, skiftisnæmingur), umframt nær steðgurin uttanlands *byrjaði* og *endaði*.

Til seinast skalt tú viðfesta fílu við skjalprógvi um steðgin. Dømi um skjalprógv kunnu vera ferðaseðlar (boardingkort), kvittanir av ymsum slag umframt váttan frá møguligum hjálparfelagsskapi.

Tá ið tú hevur skrásett steðgin uttanlands, sæst hann á yvirlitinum “*Skrásettir steðgir uttanlands*”.

Hevur tú fleiri viðkomandi steðgir uttanlands, kanst tú skráseta teir.

## 9. Aðrir viðkomandi førleikar [einans kvota 2]

Her verður upplýst um aðrar førleikar, sum skulu takast við í metingina av umsókn tíni. Talan er um førleikar, ið eru viðkomandi fyri útbúgvingina, sum t.d. KT-førleikar, málsligir førleikar ella royndir frá frítíðarvirksemi, politiskum arbeiði og sjálvbodnum arbeiði. Tú skalt lýsa, hvussu tú hevur nomið hesar førleikar, viðfesta skjalprógv fyri hesum (t.d. váttan frá ítróttarfelagi ella hjálparfelagsskapi) og síðani skráseta førleikan. Til ber at skráseta fleiri førleikar.

## 10. Grundgivin umsókn [einans kvota 2]

Grundgivna umsóknin er ein týðandi partur av umsóknini. Hetta er tín møguleiki fyri at koma til orðanna og vísa á, hvør tú ert. Frágreiðingin um teg sjálva/n skal í mesta lagi fylla eina síðu.

Grundgivna umsóknin er ein persónslýsing og ein framløga av tínum førleikum. Av tí at hon er persónlig, er eingin svarlisti, hvussu tú skrivar eina góða umsókn. Tó eru nakrar leiðreglur, sum eru góðar at halda seg til:

a) tú skalt lýsa tínar førleikar og royndir, og hvørjar tínar ætlanir og ynski eru við hesi útbúgvingini

á) tú skalt m.a. vísa á, hvat tú hevur gjørt fyri at menna og betra teg til at gerast meira skikkaða/n til útbúgvingina

b) tú skalt greiða frá, hvat eggjaði teg til at søkja inn á júst hesa útbúgvingina. Tað skal síggjast í frágreiðingini, at tú hevur sett teg inn í, hvat hetta er fyri ein útbúgving, og hvussu tú ætlar at brúka hesa útbúgving

d) umsóknin skal vera greið og væl skipað. Skriva fyrst um tað, sum er mest avgerandi fyri val tíni

ð) tú skal grundgeva fyri øllum útbúgvingum, sum eru á tínum raðfestingarlista

Tú hevur møguleika antin at skriva ævisøguna í tekstteigin í skipanini ella at viðfesta eina fílu, ið inniheldur ævisøguna. Tú kanst skriva eina grundgivna umsókn til øll útbúgvingarynski tíni, men tú hevur eisini møguleika fyri at skriva serstakar umsóknir til hvørt útbúgvingarynski.

## 11. Ymiskt

*Skerdur virkisførleiki*: Fróðskaparsetrið ynskir, at tú gert vart við møguligar skerdar førleikar (t.d. orðblindni, niðursetta hoyrn ella sjón, lamni ella sálarligar avbjóðingar), soleiðis at tíð er til at gera neyðugu fyrireikingarnar til tess at tryggja øllum lesandi á Fróðskaparsetri Føroya somu møguleikar frá lestrarbyrjan og fyri at vita, um neyðugt er at seta stuðulstænastur í verk.

*Studni* vil vita, um tú fert at søkja um ÚS lestrarstuðul. Fyri at fáa ÚS skal ein vera fulltíðarlesandi. Eisini er krav um, at tú ikki ert meira enn eitt ár seinkað/ur eftir lestrarætlanini fyri útbúgvingina. Ætlar tú at søkja lestrarstuðul frá Studna, setir tú flugubein í teigin.

**GG**: Tú skalt sjálv/ur søkja um ÚS frá Studna.

*Fulltrú*: Ynskir tú, at ein annar persónur enn tú sjálv/ur kann útfylla umsóknina tína vegna og/ella svara um upptøku, so skalt tú geva fulltrú til viðkomandi. Viðkomandi er soleiðis tann persónurin, ið Setrið kann seta seg í samband við, um spurningar eru.

Ynskir tú at geva fulltrú, setir tú flugubein í teigin, og síðani koma teigar fram at fylla út. Upplýs navn, telefon, fartelefon og bústað (land, býur/bygd, gøtunavn, húsanummar og møguligt postrúm) hjá viðkomandi, ið tú ynskir at geva fulltrú.

## 12. Váttan

Til seinast skalt tú vátta, at allar upplýsingarnar í umsóknini og viðfestu skjølunum eru rættar. Set flugubein í teigin “Váttan” og send síðani umsóknina inn.

### Samtykki

Tá tú søkir um upptøku til lestur á Fróðskaparsetrinum, verður tú biðin um at geva samtykki til, at vit kunnu viðgera upplýsingarnar, ið tú sendir okkum. Hetta er neyðugt til tess, at vit kunnu viðgera umsókn tína. Les nærri um, hvat Fróðskaparsetrið kann nýta upplýsingarnar til á www.setur.fo/samtykki.

***Tá ið Setrið hevur móttikið umsóknina, fært tú eina váttan sendandi til teldupostin, sum tú hevur upplýst í umsóknini. Í váttanini sært tú, hvar tú hevur útfylt og hvørji skjøl, tú hevur viðfest. Tað kann ganga eitt bil, áðrenn váttanin kemur fram.***

## Kunning í sambandi við upptøku 2024

Umsóknarfreistin til kvotu 2 er:

**15. apríl 2024 kl. 24:00.**

Umsóknarfreistin til kvotu 1 er:

**1. juli 2024 kl. 24:00.**

Um tú ikki hevur møguleika at senda umsóknina inn umvegis e-umsóknarblaðið, er møguligt at lata umsóknina inn teldutøka ella í pappírsformi.

Umsóknir og vegleiðingar til umsóknarbløð finnast á www.setur.fo

Umsóknin kann sendast teldutøk til:

umsokn@setur.fo

ella við Posta til:

Fróðskaparsetur Føroya
Lestrarskrivstovan
Postsmoga 272
J.C. Svabos gøta 7,
FO-110 Tórshavn

## Upptøka 2024

Boð um upptøku verða send øllum umsøkjarum í seinasta lagi fríggjadagin **12. juli 2024**.

Játtan um, at umsøkjari tekur við lestrarplássinum, skal vera Setrinum í hendi í seinasta lagi hósdagin **1. august 2024 á midnátt.**

## Miðaltøl til summarupptøkuna 2023

Til seinastu upptøku var lægsta miðaltal í kvotu 1:

| | 7-talss. |
|---|---|
| Lærari | 7,0 |
| Sjúkrarøktarfrøði | 8,1 |
| | |

Til hinar útbúgvingarnar sluppu allir skikkaðir umsøkjarar inn.

### Hjálp í sambandi við upptøku

Eru spurningar í sambandi við umsóknarblað ella upptøku annars, ber til at venda sær til Lestrarskrivstovuna á tlf. 352500 ella umvegis t-post til LSS@setur.fo. Eisini ber til at seta lestrar-vegleiðingini á Setrinum spurningar um útbúgvingar og upptøku, sí nærri kunning á heimasíðuni www.setur.fo.